## UTTAN ÚR HEIMI

### Ikki til al-Qaeda

Myndugleikarnir í Norðurkorea fara ongantíð at medvirka til, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda fær kjarnorkuvápn.

Tað sigur næstovasti leiðarin í norðurkoreanska stýrinum, Kim Yong-Nam, í samrøðu við bretska blaðið The Financial Times. Hann sigur, at Norðurkorea hevur rætt til at selja rakettir av landinum fyri at fáa fatur á fremmandum gjaldoyra, men tá tað snýr seg um tilfar til kjarnorkuvápn, fer Norðurkorea ongantíð at samskifta við al-Qaeda ella líknandi felagsskapir, sigur hann og leggur afturat, at Norðurkorea ætlar sær ikki at líða somu lagnu sum Irak.

Norðurkoreanski uttanríkisráðharrin, Paik Nam-son, sigur við Financial Times, at hann Norðurkorea fordømir yvirgang. Um viðurskiftini við USA sigur hann, at Norðurkorea við fegið hava góð viðurskifti við amerikanararnar og hevur eisini tørv í slíkum vinarlagi við teir.

### AP veksur

Fyri fyrstu ferð í trý ár fær norski Arbeiðaraflokkurin undirtøku frá meiri enn 30 prosent av teimum norsku veljarunum.

Ein meiningakanning, sum blaðið VG og sjónvarpið TV2 hava latið gera, vísir, at 30,5 prosent av teimum spurdu høvdu atkvøtt fyri Arbeiðaraflokkinum, var val til Stórtingið nú. So stóra undirtøku hevur flokkurin ikki havt síðani í apríl í 2001. Jens Stoltenberg, floksformaður, sigur við VG, at tann veksandi undirtøkan hjá flokkinum er ein ábending um, at flestu norðmenn vilja hava ein annan politikk.

Framburðsflokkurin er framvegis tann næststørsti í Noregi. Í kanningini fær hann 18,0 prosent og er beint framman fyri Høgra, sum fær 17,5 prosent, meðan Sosialistiski Vinstraflokkurin fær stuðul frá 16 prosentum av teimum spurdu. Kristiligi Fólkaflokkurin hjá Kjell magna Bondevik, forsætisráðharra fær seks prosent.

### Eingin royking

Indiska stjórnin hevur samtykt at banna royking á øllum almennum støðum, samstundis sum hon ætlar sær í hernað ímóti tubbaksverksmiðjum, sum í lýsingum eggja børnum og ungum til at festa sær í. Sum er eru tílíkar lýsingar loyvdar í India.

Heilsumálaráðharrin í landspartinum Maharashtra sigur við BBC, at endamálið við átakinum ímóti tubbakslýsingunum er at verja tey ungu, tí tað ræður um at hjálpa teimum komandi ættarliðunum, sigur hann. Fyribils er ætlanin at fáa roykibannið á almennum støðum at virka, og myndugleikarnir í teimum einstøku landspørtunum hava fingið boð um at seta lógina í verk innan tríggjar mánaðir. Tey, sum bróta lógina, fáa bót.

Kanningar hjá indisku heilsumyndugleikunum hava víst, at 208 milliónir indarar roykja ella snúsa.

### Selja meiri rúsdrekka

Seinasta heyst lækkaði avgjaldið á brennivíni og sigarettum í Danmark, og hevur fingið danir at keypa meiri brennivín og sigarettir, skrivar Politiken.

Sambært blaðnum keyptu danir 15 prosent fleiri sigarettir í januar ársfjórðingi í ár enn somu mánaðir í fjør, men brennivínssølan er vaksin uppaftur meiri - heili 40 prosent samanborið við tríggjar teir fyrstu mánaðarnar í 2003. Ein orsøk til hetta er ivaleyst, at tá avgjøldini lækkaðu, fall prísurin á einari vanligari brennivínsfløsku góðar 40 krónur, so í dag ber væl til at fáa eina fløsku fyri einar 80 krónur í handlunum. Samstundis fall prísurin á sigarettum, so ein pakki nú kostar niðan fyri 30 krónur.

Tað er tó ikki vist, at danir drekka alt brennivínið, sum teir keypa. Leiðarin á einum rúsdrekkahandli í Odense sigur við Fyens Stiftstidende, at nógvir danir, sum fyrr fóru suður um týska markið at keypa brennivín, keypa tað í Danmark nú. Samstundis vísir tað seg, at munandi fleiri norðmenn og sviar koma til Danmarkar at keypa sterkt nú, sigur hann.



Mynd: Reuters

# Hetta er lítið av miklum

**Tað finnast fleiri hundrað myndir av irakum, sum verða illa viðfarnir og misnýttir í Irak, siga bretskir hermenn. Í øðrum førum hava bretskir hermenn nýtt framferð, ið kann roknast sum krígsbrotsverk**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Er heimurin skelkaður av hasum myndunum, áttu fólk at sæð alt hitt. Hatta er bara toppurin av ísfjallinum.

Tað siga bretskir hermenn, sum vilja vera við, at nógvir irakar eru illa viðfarnir og misnýttir í bretskum fangalegum í Irak. Teir siga, at hermenninir hava fleiri hundrað myndir av irakskum fangum, sum verða píndir ella misnýttir, og at hermenninir hava býtt myndirnar sínamillum.

Ein av hermonnunum sigur við blaðið The Daily Mirror, at kanska vita teir bretsku yvirmenninir ikki, hvat hendir, men allir hermenninir vita tað, sigur hann. Kortini kann tað gerast trupult hjá herleiðsluni at finna øll prógvini, tí nógvar myndir eru seinni fyribeindar, sigur hermaðurin.

Summir bretar vilja vera við, at myndirnar, sum vísa bretskar hermenn fara illa við irakskum fangum, eru falsaðar, men tað avsanna hermenninir, sum hava latið The Daily Mirror myndirnar.

– Hetta er veruliga hent, og myndirnar eru ektaðar. Vit standa við hvørt orð, sum vit hava sagt, siga teir við blaðið.

### Krígsbrotsverk

Ein yvirmaður í bretska herinum í Irak hevur váttað fyri sjónvarpsstøðini ITV, at nógvir irakskir fangar hava verið fyri ágangi, og hann sigur seg hava hoyrt hermenn siga frá tilburðum, ið mugu roknast sum krígsbrotsverk. Millum annað verður sagt frá einum tilburði, har ein iraki bleiv biðin um at svimja yvir um eina á. Tá hann var komin nakað út frá áarbakkanum, skutu bretsku hermenninir hann.

Ákærurnar um ágangin hjá teimum bretsku hermonnunum eru komnar í kjalarvørrinum av líknandi ákærum ímóti amerikonskum hermonnum. Har hevur herleiðslan givið fleiri yvirmonnum átalu, og summir kunnu vænta at verða tveittir úr herinum, skrivar Reuters.

# Dømdur til deyða fyri atfinningar

**Ein iranskur professari er dømdur til deyða, tí hann hevur funnist at prestastýrinum**

DEYÐAREVSING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í november í 2002 varð Hashem Aghajani, sum er professari á lærda háskúlanum í Teheran, dømdur til deyða, tí rætturin vildi vera við, at hann hevði spottað ta islamsku trúnna, og tí hann hevði funnist at prestastýrinum í Teheran. Umframt deyðadómin avgjørdi rætturin, at hann skuldi fáa 74 koyrlasløg.

Dómurin vakti stóran ans, og studentar í túsundatali mótmæltu avgerðini hjá rættinum. Tað endaði við, at iranski hægstirættur ógildaði dómin í februar í fjør, men mánadagin gjørdi ein dómstólur í landspartinum Hamedan av at døma professaran til deyða.

– Rætturin hevur tikið málið uppaftur og er komin til ta niðurstøðu, at deyðadómurin er galdandi, segði ovasti dómarin í landspartinum við fjølmiðlarnar aftan á úrskurðin. Verjin hjá professaranum sigur við tíðindastovuna AP, at dómurin hjá landspartarættinum er ikki endaligur.



# Kalle ávarar børnini

**Hanne Lise Grønkjær helt fyrilestur á Landssjúkrahúsinum mánakvøldið um, hvussu óhapp og vanlukkur hjá 0-6 ára gomlum børnum kunnu fyribyrgjast. Hon greiddi millum annað frá einum átaki, har ein bamsa, nevnd Hjælpe-Kalle, er farin beint inn í heilan á børnunum og á ein ella annan hátt virkar sum ein ávaring í møguligum vandastøðum**

FYRILESTUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Hjælpe Kalle er ein bamsa, sum øll børn í Nordjyllandsamt fáa, tá tey fylla trý ár. Ein kul bamsa, kann sigast. Hon hevur sólbrillur og ryggsekk. Keppurin vendir øvugtan veg á høvdinum, og hárið stendur beint uppeftir. Í ryggsekkinum hjá Kalla er eitt plástur. Við Hjælpe Kalla fylgir ein videofilmur. Ein filmur um tvey børn og Kalla. Børnini eru trý og seks ára gomul og spæla við mangt og hvat. Hvørjaferð tey eru í ferð við eitthvørt, sum kann verða vandamikið, kemur Kalle fram og spyr, um tey ikki heldur áttu at farið eftir einum vaksnum.

Hetta ljóðar kanska ikki av so nógvum, men stuttleikin er tann, at Kalle er farin inn um hjá børnunum. Tað vísa kanningar, sum heilsufrøðingar í hesi verkætlanini hava gjørt á stovnum í Danmark.

Tað letur til, at tá børnini hava sæð filmin nakrar ferðir, so vita tey, hvar vandastøðurnar uppstanda. Men ikki bara tað. Tað er eisini soleiðis, at tá tey so spæla sjálvi við eitthvørt, og so brádliga eru í ferð við okkurt ikki heilt vandaleyst, so koma tey at hugsa um, at nú hevði Kalle komið og spurt meg, um eg ikki skuldi farið eftir mammu ella babba.

– Boðskapurin frá Kalla er farin beint inn í heilan á børnunum. Tað er ótrúligt, men hann tænir sínum endamáli, sigur Hanne Lise Grønkjær og leggur so afturat, at sjálvandi kann Kalle ikki nýtast í staðin fyri vaksið eftirlit, men at hann í øllum førum hevur gjørt børnini meiri varðug við møguliga vandar.

### Økja um vitan

Frá 1997 til 2000 var ein royndarverkætlan í gongd í Nordjyllands amt. Hendan verkætlanin gekk út uppá at fáa børn og vaksin meiri varðug við, hvussu møguligar vanlukkur ella óhapp fyri børnum í aldrinum 0-6 ár kunnu fyribyrgjast. Og so mikið væleydnað var hendan royndin, at verkætlanin í dag umfatar allar kommunurnar í Nordjyllands amt.

Verkætlanin gongur fyrst og fremst út uppá, at økja um vitanina bæði hjá foreldrum, pedagogum, dagrøktarum og øðrum sum dagliga eru um børnini og so børnunum sjálvum.

Sum so, var ikki so øgiliga nógv nýtt í øllum tí, sum Hanne Lise Grønkjær segði. Hetta við hvussu ein viðgerð møguligar skaðar hjá einum barni, til dømis at leggja kalt umslag á, um barnið hevur fingið ein stoyt ella at køla eitt møguligt brunasár niður og so framvegis. Men áhugavert var tað tó kortini at lýða á.

### Fyribyrging

– Tað veldst sjálvandi altíð um, hvussu væl barnið er fyri motoriskt, og hvat tað er fyri eitt spæl tað í veruleikanum er í holt við. Og um tað er eitt spæl, har eftirlit er neyðugt, greiddi Hanne Lise frá. Og tá er tað upp til tann vaksna, sum er um barnið, hvør avgerð verður tikin.

Ofta fanga vaksin seg sjálvi ferð eftir ferð í at siga, ikki gera so, ansa eftir har, eg havi sagt fleiri ferðir, at tú ikki mást….og so víðari. Hetta heldur Hanne Lise kann sleppast undan, um ein heldur ger tær neyðugu broytingarnar til tess, at barnið ikki kann koma til skaða.

– Heldur enn at seta so nógv forboð, so er tað nógv betur at flyta teir lutir ella at gera tær broytingarnar, sum skulu til fyri, at barnið ikki kemur til skaða. Tí hetta er jú ikki ein varandi broyting. Barnið eldist og mennist og so kanst tú so líðandi seta alt aftur, sum tað var, segði Hanne Lise.

### Felagsrættur

Hon kom eisini inn á súkluhjálmar. Her kann sigast, at hon rakti væl hjá teimum flestu. Tí hon vísti á, at vaksin altíð vilja hava, at børnini skulu nýta súkluhjálm men gera tað ikki sjálvi. So spurdi hon, hvør veruliga orsøkin til, at vaksin siga, at børn skulu nýta súkluhjálm, er.

– Er tað ikki, tí at vit eru góð við tey og ikki vilja missa tey, spurdi hon. Allar nikkaðu samtykkjandi.

– Hevur barnið so ikki rætt til at hava somu kenslur. Tey eru jú góð við síni foreldur og vilja ikki missa tey, var aftursvarið frá Hanne Lise. Ein útsøgn, sum óivað vakti nakrar tankar í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum hetta kvøldið.


*Hanne Lise Grønkjær vísti millum annað ein film um Hjælpe Kalle, sum øll trý ára gomul børn í Nordjyllandsamt fáa*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Góður boðskapur

Bjørghild Djurhuus, heilsufrøðingur, helt fyrilesturin hjá Hanne Lise vera sera áhugaverdan, og eisini helt hon boðskapin vera góðan.

– Serliga hetta tá hon tosaði um, hvussu týdningarmikið tað er at mamman er rólig, tá hon fer á skaðastovuna við børnunum, sigur Bjørghild.

Hanne Lise vísti í sínum fyrilestri á, at í nógvum førum eru tey vaksin nógv meira uppøst enn børnini sjálvi, tá tey koma á skaðastovuna, og tað er alt annað enn gott fyri barnið.

Eisini kom fram í fyrilestrinum, at í nógvum førum venda tey vaksnu sær til skaðastovuna óneyðugt. Skaðar, sum tey væl kundu viðgjørt heima, fara tey til skaðastovuna við bara fyri at vera vís.

– Hetta er kanska ikki ordliga tað, sum vit kenna í dag í Føroyum. Hatta er nokk eitt stórbýarfenomen. Eg trúgvi ikki, at bygdakonur høvdu farið á skaðastovuna við teimum skaðum, sum vórðu nevndir her í kvøld, sigur Bjørghild.

Samanumtikið heldur hon tó, at fyrilesturin var góður og viðkomandi. Áhoyrararnir vóru eini 50 í tali, bara kvinnur.

Bjørghild heldur Kalla vera eitt sera gott hugskot, sum lættliga kundi verðið ført yvir í føroyskt og verðið nýtt her.

– Um áhugi var fyri at gera tilfarið føroyskt, so haldi eg so avgjørt, at tað hevði verið nýtiligt í Føroyum, sigur Bjørghild Djurhuus, heilsufrøðingur.


*Tað er ein fakbólkur undir felagnum Føroyskir sjúkrarøktarfrøðingar, sum hevur fingið Hanne Lise Grønkjær hendanvegin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*